# Ársaðalfundur í P/F BankNordik, hósdagin 26. mars 2020

BANKNORDIK

2. mars 2020

**Uppskot frá partaeigara Kim Pedersen – dagsskrá pkt. 7:**

*Mælt verður til at nevndin áðrenn komandi ársaðalfund bankans setur seg í samband við nevndina í Grønlandsbankanum, við atliti til at kanna um grundarlag er fyri samanlegging ella øðrum sínámillum bindandi samstarvi millum BankNordik og Grønlandsbankan á javnsettum grundarlagi.*

*Svar nevndarinnar:*

*Ein av høvuðsuppgávum nevndarinnar er at taka sær av yvirskipaðu strategisku leiðslu bankans. Ein møgulig samanlegging ella sínámillum bindandi samstarv við Grønlandsbankan er mett at vera eitt handlisligt strategiskt mál ið hoyrir undir virkis- og ábyrgdarøki nevndarinnar.*

*Nevndin tekur tískil ikki undir við hesum uppskoti.*

**Nevndin**